## Meiri grønlendskt sjónvarp

Landstinglimurin Kristian Jeremiassen úr Atassut heldur, at alt ov fáa sendingar á grønlendskum máli eru í grønlendska sjónvarpinum KNR. Hann sigur, at hann ætlar sær ikki at leggja seg út í sendingar hjá sjónvarpinum, men hann heldur tó, at sendingar á grønlendskum kundu komið á skránna ístaðin fyri nógvar av krimisendingunum, sum verða sendar hvørja viku. Kristian Jeremiassen fer nú at biðja landsstýrið um pengar til grønlendskar sendingar.




# ingahavnini



*- Nú bjóða vit til veistlu, har øll, sum hava starvast í Føroyingahavnini, eru vælkomin – bæði tey, sum hava arbeitt uppi á landi og tey, sum hava róð út har yviri, sigur Ólavur í Mittúni*

láni. Tað er skomm fyri okkum, sum alt liggur og sløðist og rekst, sigur hann.

Vit spurdu eisini Ólav, hvussu tað kennist at vera ein av føroyingunum, sum í fleiri ár hevur havt sína inntøku í øðrum landi, samstundis sum vit í dag halda so fast um okkara egna arbeiðsmarknaða – og treyðugt vilja lata onnur sleppa higar at arbeiða, nú at kalla øll vinna og fiskifloti rópa eftir arbeiðsfólki.

- Eg trúgvi neyvan, at nøkur onnur tjóð hevur havt so nógv fólk í øðrum londum sum Føroyar, og tí dugi eg ikki at síggja, hvør tann stóri trupulleikin er – um hesi arbeiða heima hjá okkum upp á somu teytir, sum vit arbeiddu og arbeiða hjá teimum.

Hann sigur, at tykist undarligt at hoyra, hvussu føroyskir myndugleikar royna at halda útlendskari arbeiðsmegi burtur í Føroyum.

- Vit tóku land bæði í Íslandi og Grønlandi, og vit hava tikið land í nógvum øðrum londum við. Vit arbeiða eisini í nógvum ymiskum londum í dag. Tí dugi eg illa at síggja, hvør tann stóri trupulleikin er, um hetta er undir skipaðum viðurskiftum, sigur Ólavur í Mittúni, sum saman við Sólvág og Sólborg gleðir seg til veitsluna á Sjókaféini.



*- Vit fara at vísa myndir frá tí góðu og gomlu tíðini, og vit fara eisini at vísa myndir, sum lýsa, hvussu Føroyingahavnin sær út í dag, sigur ein av fyriskiparunum*



*Kalvin, sum Tom Richard Kristiansen fekk (mynd), vigaði 629 pund. Hann var tríggjar metrar langur og ein metur breiður*

# Yvirvaksnir kalvar

**Herfyri fekk norðmaðurin Tom Richard Kristiansen ein velduga stóran kalva í gørnum sínum. Norðmenn siga, at hetta er størsti kalvi, sum veiddur er í norskum sjógvi. Men spurningurin er, um kalvin, sum føroyski skiparin Hjalgrím Vestergaard fekk við Skjøtninberg, ikki var størri**

KALVI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Størsti kalvi, sum norðmenn vita um er veiddur í norskum sjógvi, er kalvin, sum Tom Richard Kristiansen fekk í gørnum sínum herfyri. Hesin risakalvi vigaði heili 629 pund, sum er 49 pund meira enn gamla metið, sum soleiðis var 580 pund.

Vit vita tó ikki, um Tom Richard hevur fingið nýggja metið skrásett og góðkent.

Kalvin hjá honum varð máldur at vera tríggjar metrar langur og ein metur breiður.

### Seks kurvar

Sosialurin hevur frætt, at ein føroyskur skipari í Noregi, Hjalgrím Vestergaard av Tvøroyri, fekk ein velduga stóran kalva í norskum sjógvi í 2001.

Hjalgrím var tá skipari við norska skipinum Skjøtninberg.

Á tí eina túrinum fingu teir ein kalva, sum var 2,85 metrar langur, 1,36 breiður og 50 sentimetrar tjúkkur.

Teir skóru upp í seks kurvar av flaki - og haraftrat varð nógv koyrt burtur, sigst.



*Kalvin, sum Hjalgrím Vestergaard og hansara menn fingu við Skjøtninberg, var 2,85 metrar langur og 1,36 metrar breiður*

### Helst størri

Kønir meta, at kalvin, sum føroyski skiparin fekk út fyri Tanafjørðinum í Noregi, hevur verið størri enn norska metið.

Hetta er tó ilt at siga, tá hesin ongantíð kom til lands og tískil ikki varð skrásettur nakrastaðni.

Kalvin hjá Hjalgrími Vestergaard var eitt sindur stytri, men munandi breiðari enn kalvin hjá Tom Richard Kristiansen.